

*Alberg Gaardlykke*

# Krás flettir í góðkendum hølum

– Vit eru umbidnir 600 seyðir til matstovur og handlar, men hava higartil bara keypt 200. Bøndur eru tí vælkomnir at venda sær til okkara, sigur Alberg Gaardlykke.

Matvøruvirkið Krás, sum P/F Poul Hansen eigur og rekur í Hósvík, fer í morgun undir at fletta seyð, sum felagið keypir frá bøndrum.

Tað var MBM, Megin-felag Búnaðarmanna, sum í sínari tíð átti og rak virkið í Hósvík sum sláturvirki. Men í fleiri ár hevur Krás verið matvøru-framleiðari burturav – og ikki sláturhús.

Nú hevur Krás riggað tey gomlu hølini, har slátur var áður, til aftur og hevur fingið góðkenning frá Heilsufrøðiligu Starvs-stovuni til at fletta seyð.

Alberg Gaardlykke, leiðari á Krás, sigur, at fletting tó bara kann fara fram, meðan matvøru-framleiðslan annars liggur still.

- Tí koma vit bara at fletta fríggjadag og leygardag. Vit byrja í morgun, og í fyrsta umfari hava vit 50 seyðir at fletta.

Hann sigur, at Krás keypir seyðin frá bøndrunum.

– Vit eru longu umbidnir 600 seyðir til matstovur og handlar, men hava higartil bara keypt 200. Bøndur eru tí vælkomnir at venda sær til okkara, sigur hann.

Teir byrjaðu at fletta á Krás stundisliga í morgun og væntandi verður flett hendan fyrsta dagin til middags.

– So, hetta er líka sum ein bleytur startur, sigur leiðarin á Krás, Alberg Gaardlykke.

Maðurin, sum flettur á hesi myndini, er ein av teimum, sum starvast hjá Krás og verður við í flettingini í dag.

Myndin er tó ikki tikin á Krás.

vilmund@sosialurin.fo

# Bankahjálpin




Tað verður Astrup, ið aftur skal rudda upp via Finansiel Stabilitet

## Í MORGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

## SUNNUDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 11 og 14 stig.

## MÁNADAGIN




Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og suðri og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 11 og 14 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 981 hPa. vestan fyri Írland fer í útnyrðing og dýpist. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum leygarnáttina.




**Komandi nátt:**
Djúpa lágtrýstið sunnan fyri Ìsland stendur mestsum í stað og brúgvalagið yvir Føroyum fer í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 94 mm



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Nuuk | 5 | Tromsø | 6 | Moskva | 16 | Athen | 26 |
| Reykjavík | 11 | Bergen | 12 | Berlin | 25 | Beijing | 30 |
| Tórshavn | 10 | Oslo | 22 | Paris | 20 | New Dehli | 30 |
| Lerwick | 9 | Stokkhólm | 20 | Madrid | 28 | Bangkok | 34 |
| Aberdeen | 12 | Keypmannah. | 19 | Róm | 26 | Sydney | 14 |
| London | 19 | Helsinki | 16 | Malorca | 26 | New York | 33 |

## VESTFALLSKYRRINDI

21. sept — Mánin longst frá jørðini
23. sept — Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 22. sept | 06:40 | 18:58 | 05:40 | 17:58 | 05:55 | 18:13 | 08:40 | 20:58 | 09:40 | 21:58 | 04:55 | 17:13 | 03:55 | 16:13 | 06:55 | 19:13 | 07:55 | 20:13 | 06:25 | 18:43 | 07:40 | 19:58 |
| 23. sept | 07:16 | 19:33 | 06:16 | 18:33 | 06:31 | 18:48 | 09:16 | 21:33 | 10:16 | 22:33 | 05:31 | 17:48 | 04:31 | 16:48 | 07:31 | 19:48 | 08:31 | 20:48 | 07:01 | 19:18 | 08:16 | 20:33 |
| 24. sept | 07:51 | 20:09 | 06:51 | 19:09 | 07:06 | 19:24 | 09:51 | 22:09 | 10:51 | 23:09 | 06:06 | 18:24 | 05:06 | 17:24 | 08:06 | 20:24 | 09:06 | 21:24 | 07:36 | 19:54 | 08:51 | 21:09 |
| 25. sept | 08:28 | 20:47 | 07:28 | 19:47 | 07:43 | 20:02 | 10:28 | 22:47 | 11:28 | 23:47 | 06:43 | 19:02 | 05:43 | 18:02 | 08:43 | 21:02 | 09:43 | 22:02 | 08:13 | 20:32 | 09:28 | 21:47 |
| 26. sept | 09:07 | 21:27 | 08:07 | 20:27 | 08:22 | 20:42 | 11:07 | 23:27 | - | 12:07 | 07:22 | 19:42 | 06:22 | 18:42 | 09:22 | 21:42 | 10:22 | 22:42 | 08:52 | 21:12 | 10:07 | 22:27 |